

## Fiskivinnuting í morgin

Í morgin 22. mars skipar Havstovan fyri Fiskivinnutingi í Norðurlandahúsinum. Á skránni er, hvussu verður fiskivinnan undir Føroyum burðardygg og lønandi?

Fiskivinnutingið er skipað við fyrilestrum og kjaki um, hvussu fiskivinnan undir Føroyum kann gerast burðardygg og lønandi. Umboð fyri arbeiðstakara og arbeiðsgevara í fiskivinnuni halda fyrilestur umframt umboð fyri granskingarstovnar og onnur, sum hava hildið seg framat í kjakinum um eina lønandi fiskivinnu.




*Frank Møller eigur og rekur nýggja handilin*

# Siðsøguligt handilskonsept í Miðbýnum

**HANDIL Ein nýggjur og øðrvísi handil er latin upp í miðbýnum í Havn**

Magnus Gunnarsson

Tað er handilin MIÐGARÐ í Dr. Jakobsensgøta 12, sum Frank Møller eigur og rekur.

Frank selur museumssmúkkur og søguligar lutir, samstundis sum hann ger søguligar møblar. Handilin er innrættaður í gamlan stíl við t. d. gomlum møblum og ymiskum frá víkingatíðini.

Ein partur av handlinum er innrættaður sum verkstaður, har hann hevur ein snikkarabonk og onnur amboð til at gera søguligu møblarnar, sum hann síðan selur í handlinum.

Frank, sum er dani og hevur arbeitt sum museumspedagogur og museumshandverkari á víkingasavninum Ladby á Fyn, sigur, at øll eru vælkomin inn á gólvið til eitt siðsøguligt prát yvir ein kaffimunn.

## Gøla um heilivág

Heilivágur móti kolesteroli er ein gøla

562.000 danir vóru í 2010 ávístir at nýta serligan heilivág fyri at minka kolesterolininnihaldið í blóðinum, sum liður í at forða fyri blóðtøppi í hjartanum.

- Hetta er størsta heilivágsgøla í nýggjari tíð, sigur granskari, skrivar Business-line.fo

Granskarin og fráfarni serlæknin, Uffe Ravnskov, hevur búkt meira enn 20 ár til at granska kolesterol-trupulleikan. Hann er partur í einum altjóða granskingarsamstarvi, ið ikki góðtekur ta viðgerð, ið givin verður sjúklingum móti ov høgum kolesteroli í blóðinum.

Bólkurin kallar seg "Thincs - The International network of Cholesterol Skeptics".

Fólk við lágum kolesteroltali gerast akkurát líka æðraforkálkað sum fólk við høgum tali. Tvær amerikanskar kanningar frá 2009 vísa, at kolesteroltalið hjá innlagdum sjúklingum við brádligum hjartatilburði, var lægri enn miðal.

Viðgerðin kann í nøkrum førum gera gagn, men tað stavar helst frá øðrum, enn lækking í kolesteroltalinum. Undir øllum umstøðum er gagnið sera lítið og bara galdandi fyri ungar og miðaldrandi menn, als ikki fyri kvinnur og eldri fólk.

Heilivágur móti kolesteroli kann hava álvarslig hjáárin. Nevnast kunnu skaðar í vøddum, livir, nýrum, krabbamein og impotens, og aðrar mentalar trupulleikar sum td. minnistap, tunglyndi og trupulleikar við svøvni.

Ein ensk kanning frá 2010 millum 200.000 frískar sjúklingar sum fingu heilivág móti kolesteroli vísti, at talið av hjáárinum var nærum tvífalt so høgt sum talið av blóðtøppum, sum heilivágurin verður tikin ímóti.

Tað, sum kemur mest óvæntað, sigur Uffe Ravnskov, er, at tað finnast meira enn 20 ymiskar kanningar ið vísa, at eldri fólk við høgum kolesteroltali liva longst. Hesum hevur enn ongin kunnað mótprógvað!

## Athena umvælast í Føroyum

Hósdagin skrivaði Thor-samtakið og Articon undir avtalu um at gera umvælingararbeiðið umborð á Athenu, eftir eldin í oktober í fjør.

Skipið liggur við bryggju í Saltangará, og alt arbeiðið verður gjørt í Føroyum.

- Vit eru sera fegin um, at umvælingin kann verða gjørd her heima, og at allir undirveitarar verða føroysk feløg.

Tað sigur Gunnbjørn Joensen, annar av reiðarunum hjá Thor í Hósvík.

Hann leggur aftrat, at arbeiðið fer í gongd beinanvegin, og at skipið verður aftur í vinnu tíðliga í summar.




# Stjóraskifti á bryggjuni

**NORÐURBRYGGJAN Katrin Elsubudóttir Heinesen verður nýggjur stjóri**

Leo Poulsen

Anders Berndtsson hevur av persónligum orsøkum og eftir gjølla umhugsan valt at seg úr starvi sum stjóri á Norðurbryggjuni.

Karin Elsubudóttir Heinesen hevur takkað ja til tilboðið um at taka við stjórastarvinum og tekur við 1. mai. Karin er 42 ára gomul og ættað úr Klaksvík. Hon hevur exam.art prógv í Norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum av Fróðskaparsetri Føroya, og cand. mag. prógv í Lista- og mentanarvísund av lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Seinastu 10 árini hevur hon starvast á Norðurbryggjuni, og sjey tey seinastu árini hevur hon verið mentanarstjóri.

